# Ársins Leiðaradagur 2008

25. januar

- hvat gera hini, hvat kanst tú gera og hvat er best at gera?

## Árligi netverksdagurin hjá føroyskum leiðarum

Kom og menga teg við aðrar leiðarar og hoyr tað feskasta um rekruttering og fasthaldan av starvsfólki, konfliktmekling, um Blue Ocean Strategy, útlendska arbeiðsmegi og um kværulantar á arbeiðsplássum, umframt fleiri frekar paneldiskussiónir. Set tann 25. januar av til netverkan og íblástur. Tekna teg bara longu nú - avmarkað pláss!



Tekna teg og les meira á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464) | Synergi



# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 5 ára gamalt barn við serligum tørvi í Porkeris kommunu at byrja 1. februar 2008 ella so skjótt sum gjørligt.

Stuðulin kemur í samstarvi við Sosialu deild, NSR tænastuna í Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er fulla tíð og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast inn Porkeris Kommunu att. Sosiala deild í seinasta lagi 14. januar 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**

Lesið

**Sosialin**

-so eru tit við!

LØGTINGSVALNEVNDIN

Leivur Harryson fm. – Malan Johansen – Bárður Larsen

## Valevnislistar til løgtingsvalið 19. januar 2008

Við hesum verður mint á, at valevnislistar til løgtingsvalið 19. januar 2008 skulu vera formanninum í løgtingsvalnevndini í hendi í seinasta lagi:

**leygardagin 29. desember 2007 kl. 18.00.**

Valevnislistin skal verða latin inn av einum stillara.

Gjøllari reglur um valevnislistar eru ásettar í §§ 17 – 18 í løgtingsvallógini (Ll. nr. 49 frá 20. juli 1978 "um val til løgtingið", sum seinast broytt við Ll. nr. 97 frá 1. november 2007).

**Í løgtingsvallógini er m.a. ásett:**
- at ein valevnislisti ikki má hava fleiri enn 43 valevni,
- at valevnini skulu vera so skilliga lýst við navni, starvi og bústaði, at ongin samanblanding við nakran annan valbæran persón kann standast av,
- at valevnislistin skal vera undirskrivaður av valevnunum og av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 15 veljarum sum stillarum,
- at hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi og bústaði,
- at ongin má stilla upp á meira enn einum valevnislista,
- at ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista.

Á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum www.imr.fo undir "Dømi um valevnislista" er at finna oyðublað til valevnislista og stillarar.

5. januar 2008 kl. 18.00 er síðsta freist hjá flokkum skrivliga at boða formanninum fyri løgtingsvalnevndini frá, hvønn ella hvørjar valevnislistar flokkurin góðkennir sum listar floksins.

**Vegna løgtingsvalnevndina**
Leivur Harryson
formaður

Smærugøta 22 · FO-100 Tórshavn
Telefon: 55 80 80 · Privat: 51 97 17
Fax: 35 51 01 · Teldupostadressa: leivur@lg.fo

SEV

# Vilt tú hava ávirkan á el-trygdina?

**Eitt starv sum eftirlitsfólk í Vestmannaøkinum er leyst at søkja til setan skjótast tilber.**

**Starvið**
Tú kemur at samskifta við elinnleggjarar og hava eftirlit við nýggjum elinnleggingum, umframt skráseting av hesum í Norðurstreymoy, Vágum og Suðuroy. Ein partur av arbeiðinum verur framhaldandi dagføring av 5Amper mátianleggum kring landið, og at veita tekniska kundatænastu. Eisini kemur tú at gera stakroyndir av elmálarum og umsita málaragoymsluna hjá SEV. SEV hevur økisskrivstovur í Tórshavn, Vestmanna, Skálabotni, Klaksvík og Vági.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava prógv sum elinnleggjari, maskinmeistaraútbúgving við starvsroyndum innan eløkið ella samsvarandi útbúgving.Vit vænta at tú hevur góðar førleikar innan krøv og gerð av elinnleggingum, góð evni at samskifta og samstarva og ert fyrikomandi.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er týsdagin 15. januar 2008.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Dánjal Jógvan Hansson á telefon nr. 346800.